## Landssjúkrahúsið
**FO-100 Tórshavn**

# 1. assistentur til Skurðgongdina

Eitt starv sum 1. assistentur á Skurðgongdini er leyst til setan 1. apríl 2000 ella eftir nærri avtalu.

Fyrsti assistenturin myndar saman við deildarsjúkrasystrini leiðsluna á deildini. Hendan ábyrgd umfatar m.a. sjúklingarøkt og starvsfólkaumsiting, umframt frálæru til starvsfólkið og sjúkrasystralesandi.

Starvið er eitt fulltíðarstarv við avmarkaðum tilkallivaktum frá bústaði.

**Vit søkja eina sjúkrasystir**
- við hollum royndum innan arbeiði á skurðgongd
- við áhuga fyri undirvísing
- við kunnleika/áhuga fyri brúk av teldu

**Vit bjóða**
- eina deild við nógvum fjølbroyttum uppgávum
- eina deild har nógv er at gera
- ávirkan á tilrættalegging av egnari arbeiðstíð

Løn- og setanartreytir samb. sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Nainu Túgvustein, deildarsjúkrasystir á telefon 313540 lokal 138.

Umsóknarfreist er 11.02.2000.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum verður at senda til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**FO-100 Tórshavn**




# Hárfríðkari søkist til Danmarkar

Familjuhárfríðkanarstova í Keypmannahavn søkir hárfríðkara. Vit tosa føroyskt og hava góðar arbeiðsumstøður. Kunnu møguliga hjálpa við bústaði.

**Frisør Tonni**
Frederik Sundsvej 53
2400 København NV
Tel. 0045 38194909

# Pedagogur

Vøggustovan við Velbastaðvegin søkir eftir einum pedagogi 25 tímar um vikuna, at byrja 1. februar 2000 ella eftir nærri avtalu.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 42 vøggustovubørn. Tríggjar stovur hava 10 børn hvør og ein stova hevur 12 børn.

Tann, ið settur verður skal hava góð samstarvsevnir og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður tað fyribils sett við fólki uttan pedagogútbúgving.

Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða stovninum í hendi í seinasta lagi 19. januar 2000.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran Inga-Mariu Sørensen ella varaleiðaran Elsu Nielsen.

**Vøggustovan við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 39
100 Tórshavn
Tlf. 314379 • Fax 321179

SU

# Sosialistiskt Ungmannafelag
## SU er ungmannafelagið hjá Føroya Javnaðarflokki

SU legan verður í Øravík 14.-16. januar 2000. Øll ung javnaðaráhugaði eru vælkomin við. Tú kanst tekna teg til leguna, við at ringja til Kristoffur tlf.: 281118 ella til Fíu tlf: 321011. Tú kanst eisini senda eitt mail: sosialistiskt_ungmannafelag@hotmail.com., Fía@sansir.fo., Rannva78@forum.dk.

**Skráin**
Fríggjakvøldið 14. januar kl. 20.00: Fyrilestur **Ung í 21. øld** v/ Jóannes Eidesgaard.

Leygardagin 15. januar: Aktivitetur í lokalfeløgunum. Hvussu skipa vit nevndararbeiðið og felagsarbeiðið úti í lokaløkjunum.

**Sosialistiskt Ungmannafelag í Føroyum**

Halt sosialin

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Avloysari til skrivstovustarv

Føroya Arbeiðsgevarafelag søkir eftir einum fólki til skrivstovuna at byrja sum skjótast sum avloysari fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi.

Arbeiðið fevnir um skrivstovuhald, skrivaraarbeiðið, avgreiðslu og samskiftið við limir og viðskiftafólk.

Tað er ein fyrimunur um tú:
- hevur hóskandi útbúgving og arbeiðsroyndir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevnir
- dugir væl at samskifta á føroyskum
- hevur telduførleika á brúkarastøði (Windows Office forrit)

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og áhugavert skrivstovustarv og løn eftir avtalu. Starvssetanin varar væntandi til 1. september 2000.

Skrivlig umsókn, merkt »Skrivstovustarv«, eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. jan. 2000. Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til Jan Mortensen, ella Bjørgfríð Ludvig á tlf. 311864.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
**Vinnuhúsið,Postsmoga 179**
**110 Tórshavn**

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 11 vinnufeløgum og í løtuni starvast 5 fólk í umsitingini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møgulig kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og politiskari ávirkan. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

# Tann rætta brúkta bilin til tann rætta prísin -finnur tú sjálvsagt hjá P/f Wenzel

**Nú dagførdir hvønn dag á heimasíðu okkara www.wenzel.fo**



Sosialurin - 311820

Ford **P/f Wenzel** Ford
Akranesgøta 5 - FO 100 Tórshavn - Tlf. 313873 - Fax 311173



# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir avloysara fyri stuðulsfólk, til 8 ára gamlan deyvan, rørslu- og talutarnaðan drong í Tórshavn.

Arbeiði hjá stuðlinum verður í neyvum samstarvi við drongin, familjuna, Almannastovuna og onnur fakfólk.

Arbeiðið fevnir um at geva honum tað neyðugu røktina og at fara við honum til ymisk skipaði tiltøk. Serligur dentur skal verða lagdur á samskifti við drongin.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna og er um morgunin áðrenn drongurin fer í skúla og seinnapartar í Frítíðarskúlanum.

Setunartíðin er frá 01.02.00 og fyribils til uml. 01.10.00.

Neyðugt er, at viðkomandi, ið settur verður hevur koyrikort.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til 31 48 22, Ragnhild Dahl.

Umsóknir mugu verða okkum í hendi í seinasta lagi 21.01.00 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
att. Ragnhild Dahl
Box 196
110 Tórshavn

# Pedagogar

Søkt verður eftir tveimum pedagogum til Dagstovnin á Argjum. Annað er á vøggustovu 40 tímar um vikuna frá 1. feb. 2000 ella eftir nærri avtalu, og hitt er eitt farloyvisstarv á barnagarðsstovu 30 tímar um vikuna frá 1. apríl til 15. sept. 2000.

Dagstovnurin á Argjum er ein sjálvsognarstovnur. Á stovninum ganga 70 børn og samanlagt eru vit 18 starvsfólk.

Á stovninum eru fýra barnagarðsstovur og tvær vøggustovur, har tann eina barnagarðsstovan er ein teknmálsstova. Á hvørjari stovu ganga 12 børn, á teknmálsstovuni 10 børn.

Vit ynskja, at tú saman við okkum skapar eitt umhvørvi fyri børnunum, har tey kunnu trívast og mennast. Somuleiðis, at tú er nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu. Harumframt ynskja vit, at tú ert virkin á stovninum við atliti at víðariútvikling av hesum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kann tú seta teg í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara, á tlf. 319019.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 22. januar 2000.

**Dagstovnurin á Argjum**
Traðagøta 55
160 Argir

# Pedagogar
## til Dagstovnin í Fuglafirði

1. Søkt verður eftir pedagogi, 35 tíma viku, at byrja 01.02.2000, ella skjótast tilber. Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.
2. Søkt verður eftir pedagogi, 30 tíma viku, at byrja 01.02.2000, ella skjótast tilber. Starvið er á stovu við 18 børnum í aldrinum 3-8 ár.

Lønin verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Um ikki nóg nógvir pedagogar eru til størvini, kunnu hjálparfólk verða sett fyribils í pedagogstørvini.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran á dagstovninum tlf. 444940.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 21. januar kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 6. januar 2000
**Fuglafjarðar býráð**

**Starv**

# LÆRLINGUR

Hervið verður søkt eftir skrivstovulærlingi til Farmastøðina í Tórshavn.

**Uppgávurnar hjá farmaflutningsdeildini**
Høvuðsuppgávan hjá farmastøðini, sum er undir farmaflutningsdeildini, er at samskipa, viðlíkahalda og menna farmaflutningin millum meginøki og útjaðarøkini í Føroyum.

Aðrar høvuðsuppgávur eru:

- Tryggja ein støðugan rakstur av farmaflutninginum
- Kundamóttøka
- Frankering
- Skipaavgreiðslur
- Ráðlegging og samskipan viðvíkjandi koyring.

**Starvið fevnir um**
Sum lærlingur á farmastøðini kemur tú m.a. at arbeiða við fylgjandi uppgávum:

- Frankering
- Fakturering
- Shipping
- Hagtøl

**Vit rokna við, at tú**
- hevur HH, FHS ella líknandi prógv
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva
- er góður teldubrúkari
- hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga
- hevur góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 17. januar 2000.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343060 ella senda e-post: hab@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

www.sosialurin.fo

# Stuðulsfólk

Vegna ov fáar umsóknir, lýsa vit av nýggjum eftir stuðulsfólki til seks ára gamlan drong í Kollafirði.

Arbeiði hjá stuðlinum verður í neyvum samstarvi við familjuna, Almannastovuna og onnur fakfólk, at stimbra dreinginum við spæli og venjingum, og annars vera við til at geva honum ein innihaldsríkan gerandisdag, einsamøllum og saman við øðrum. Serligur dentur skal verða lagdur á málmenningina og samskifti við drongin.

Stuðulin skal eisini kunna fara við honum til fysioterapi, taluvenjingar o.a.

Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna.

Setunartíðin er frá 01.02.00 og fyribils til 01.07.00.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til 31 48 22, Ragnhild Dahl.

Umsóknir mugu verða okkum í hendi í seinasta lagi 21.01.00 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
att. Ragnhild Dahl
Box 196
110 Tórshavn